## NORA stuðlar

Norrøna Atlantssamstarvið NORA hevur gjørt av at játta tíggju verkætlanum tilsamans 2,3 mió. krónur í stuðuli, og fimm teirra hava samband við tilfeingið í havinum. Ein skal kanna skaða á hummara, ein skal kanna livilíkindini hjá gággu, og um tað ber til at veiða gággu til matna, ein skal kanna møguleikarnar at vinna evnið astaxanhin úr rækjuskeljum, ein skal menna samstarv millum nýskapan, og tann fimmta skal menna kunnleikan um kóp.

## Spyr um skúlar

Løgtingskvinnan Heidi Petersen vil nú hava at vita frá Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni, nær arbeiðið at byggja nýggjan fiskivinnuskúla í Vestmanna byrjar, og nær skúlin verður liðugur. Hon vísir á, at eftir upprunaligu ætlanini skuldi skúlin verða liðugur í ár. Hon vil eisini hava at vita, nær farið verður undir at byggja skúladepilin í Hovi, og hvussu nógv hann er dýrkaður samanborið við upprunaligu ætlanina at byggja í Vági.

# Nýggjur leiðari settur í Føroyingahúsinum

**Hans Petur í Brekkunum er settur sum nýggjur leiðari í Føroyingahúsinum í Keypamannahavn. Hans Petur er kanska fyrst og fremst kendur sum dugnaligur tónleikari, men nú skal tónleikarin royna seg sum leiðari**

NÝGGJUR LEIÐARI Í FØROYINGAHÚSINUM

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*(rokur@sosialurin.fo)*

Fyrr í ár, gjørdist greitt, at virkandi leiðarin í Føroyingahúsinum, Martin Fjallstein, segði seg úr starvinum. Sostatt skuldi maður koma í mans stað, og hesin maður er nú funnin.

Starvið varð lýst leyst í oktobermánað. Sambært heimasíðuni hjá Føroyahúsinum komu 9 umsóknir inn. Talan var um 2 kvinnur og 7 menn.

Heimasíðan skrivar, at allir umsøkjarar eru dámligir og áhugaverdir, men vísur á, at bert tann eini kann setast. Og valið fall á 33 ára gamla havnarmannin Hans Petur í Brekkunum. Hann tekur við starvinum frá 1. februar komandi ár. Og Hans Petur er greiður í síni talu – Hetta er eitt dreyma arbeiði, sigur hann.



### Saxofonin skift út við skrivaraborðið

Nýggi leiðarin hevur búleikast í Danmark í eini 13 ár. Hans Petur varð útbúgvin í Musikkonservatoriinum í Århus í 2000, og hevur síðani undirvíst á eftirskúla í Danmark seinastu árini. Eisini hevur hann verið virkin sum tónleikari, har hann millum annað hevur gjørt um seg í bólkunum Take Off og Brekku Brothers. Vit fingu orð á Hans Petur, og tað er eyðsæð, at hann fegnast um nýggja starvið.

### Føroyingahúsið stóran týdning

– Eg havi leingi gingið við tankanum um, at hatta er eitt avbera spennandi starv. Í míni tíð í Danmark, havi eg ofta verið inni á gólvinum, bæði sum tónleikari og sum vitjandi, og mær hevur altíð dámt andan í húsinum. Líka síðan eg var smádrongur, havi eg skipa fyri tiltøkum. Sostatt eri eg ikki heilt óroyndur sum fyristøðumaður.

– Tá ið so starvið varð lýst leyst, ivaðist eg ikki eina løtu; eg søkti beinanvegin. Føroyingahúsið hevur stóran týdning fyri føroyingar í Danmark. Hetta er eitt hús, sum loyvir øllum framat. Her skal verða rúm fyri nógvum ymiskum virksemi, og eg ætli at røkja húsið eftir hesari hugsjón.

– Tá ið eg skrivaði mína umsókn, ímyndaði eg mær, hvussu skilið hevði verið, um onki Føroyingahús var. Tá skilti eg, at eg hevði verið millum teirra, ið saknaðu eitt slíkt hús. Sostatt haldi eg, at Føroyahúsið hevur stóran týdning fyri føroyingin í Danmark. Húsið hevur ikki bara mentanarligan týdning. Tað hevur eisini stóran praktiskan týdning. Hetta er eitt stað, har ið fólk, føroyingar sum útlendingar, kunnu venda sær, um tey hava eitthvørt ivamál.

### Ongin kollvelting

Hvussu fer tað at merkjast, at tú er nýggjur leiðari í húsinum?

– Eg ætli mær ikki at koma inn sum ein hvirluvindur og kollvelta alt. Brúkarin av húsinum fer sostatt ikki at merkja so nógv til nýggja leiðaran beinanvegin. Men eg havi sjálvandi nógv hugskot og ætlanir, sum eg ætli at føra út í verkið, men hetta kemur meiri at síggjast og merkjast í framtíðini.

Tað er ongin loyna, at Hans Petur er tónleikari, men Hans Petur vísur aftur, at Føroyingahúsið nú fer at verða tónleikahús burturav.

– Eg eri ikki settur sum tónleikari. Eg er settur sum leiðari, og skal røkja øll áhugamál, sum húsið áður hevur rikið. Men tónleikurin liggur mær nær, og tískil kemur hann altíð at hava nógv rúm í húsinum, sigur Hans Petur.

Á heimasíðuni hjá Føroyingahúsinum stendur at lesa, at fráfarandi leiðarin ynskir Hans Petur hjartaliga tillukku, og ynskir honum góða eydnu við nýggja starvinum. Heimasíðan skrivar, at húsið skal brynjast til avbjóðingar sum liggja fyri framman, og tað eru hesar, sum nýggi leiðarin skal lofta.

# Kaldbaksvegurin ikki stongdur kortini

**Kaldbaksvegurin verður ikki stongdur, soleiðis sum Landsverk annars hevur boðað frá. Bjarni Djurholm hevur tosað við Landsverk, og saman við teimum fer hann at finna eina loysn**

SAMFERÐSLA

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Henda loysnin inniber, at ferðslan kortini ikki verður leidd til og frá Havn eftir Oyggjarvegnum, sum annars hevði verið einasta alternativið, um Kaldbaksvegurin stongdist.

Við Útvarpið í morgun segði Bjarni Djurholm, at hann hevur tosað við Landsverk og saman fóru teir at finna ein loysn upp á nevnda trupulleika. Helst verður hetta við at leggja eina vegøksl rundan um, at arbeitt verður. Bjarni Djurholm segði, at túsundtals bilar koyra til og frá Havn dagliga, og at hesir ikki allir vóru skøddir til at ferðast eftir Oyggjavegnum.

Bjarni Djurholm visti ikki sjálvur av, at Landsverk ætlaði at steingja Kaldbaksvegin frá í dag at rokna og fram til fríggjadagin. Men síðani hann fekk boðini hevur hann tosað við Landsverk og avtalað, at ferðslan eisini komandi dagarnar til og frá Havn, verður eftir Kaldbaksvegnum.